ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv.

Kringvarp Føroya
Norðari Ringvegur
Postboks 1299
110 Tórshavn

Tórshavn 16.01.2014
J. nr. 20140012/CA/ga

**Viðv. tíðindaflutningi um Jørgen Niclasen, landsstýrismann í fíggjarmálum**

Jørgen Niclasen hevur vent sær til mín í sambandi við tíðindaflutningin í Kringvarpi Føroya, sum hevur verið borin fram síðani 19. desember 2013.

Síðani 19. desember 2013 hevur Kringvarp Føroya bæði gjøgnum útvarp og sjónvarp áhaldandi sett fram skuldsetingar mótvegis Jørgeni Niclasen um, at hann fyri 20-25 árum síðani skal hava snýtt tollvaldið í sambandi við, at hann í eitt tíðarskeið var stjóri fyri P/f N. Niclasen í Sørvági.

Slíkur tíðindaflutningur er ærumeiðandi og í stríð við góðan fjølmiðlasið.

Eg fari við hesum at krevja, at Kringvarp Føroya beinanvegin við almennari fráboðan tekur aftur skuldsetingina móti Jørgeni Niclasen um at hava snýtt í tolli.

Verður hetta ikki gjørt, verður málið verður kært til Fjølmiðlakærunevndina, eins og fyrivarni verður tikið um at úttaka stevning mótvegis leiðsluni fyri Kringvarp Føroya fyri ærumeiðing.

Kringvarp Føroya hevur einki grundarlag fyri at seta fram slíkar skuldsetingar mótvegis Jørgeni Niclasen. Tvørturímóti er kringvarpið vitandi um, at málið hevur verið viðgjørt av ákæruvaldinum, sum longu í februar 1994 staðfesti, at onki lógarbrot er framt í málinum.

Av málinum framgongur, at fráboðanin um uppsøgn av tollkredittinum ongantíð er send til P/f N. Niclasen.

Eisini framgongur av málinum, at Skipafelagið Føroyar, sum hevði ábyrgdina av vørugoymsluni í Sørvági, heldur ikki visti nakað um uppsøgnina av sama tollkreditti.

Av málinum framgongur eisini, at tollvaldið fleiri ferðir var á eftirlitsvitjan hjá P/f N. Niclasen og staðfesti, at vørur vóru útflýggjaðar, uttan at tollur samstundis var goldin.

Eisini framgongur av málinum, at tollkravið móti P/f N. Niclasen eisini viðvíkur vøru á goymslum hjá øðrum skipafeløgum enn P/f Skipafelagnum Føroyar.

Samsvarandi hesum er niðurstøðan hjá Føroya Landfúta, sum er fráboðað tollvaldinum við skrivi, dagfest 7. februar 1994, at einki revsivert er farið fram.

Høvuðsgrundgevingin var hendan:

> „Iøvrigt skal jeg bemærke, at opsigelsen af toldkreditten ved skrivelse af 29. januar 1988 ikke ses at være fulgt op af tiltag til at sikre, at denne blev effektiv, idet udleveringen af varer blot fortsatte som hidtil, og selv om det ved kontrolbesøg blev konstateret, at der var udleveret varer i strid med den opsagte toldkredit, blev der ikke skredet ind, og forholdet blev således stiltiende accepteret."

Við øðrum orðum hevur Føroya Landfúti fyri 20 árum síðani í greiðari niðurstøðu staðfest, at einki lógarbrot er framt í málinum. Hóast hetta heldur kringvarpið fæst við páhaldið um, at lógarbrot skal vera framt. Nevnast kann, at so seint sum í tíðindasendingini seinnapartin í gjár greiddi kringvarpið í stríð við veruleikan sínum lurtarum frá, at brot skal vera framt á § 7 í tágaldandi tolllóg.

Upprunin til tíðindini hjá Kringvarpi Føroya stavar frá einum tíðindamanni hjá portalinum. Kringvarpið er í hesum sambandi viðtandi um, at skuldsetingin hjá portalinum um tollsnýt ikki hevur nakað samband við objektiv prógv, men at skuldsetingin einans hevur samband við subjektivu uppfatanina hjá viðkomandi tíðindamanni á portalinum.

Kringvarpið er eisini vitandi um, at viðkomandi tíðindamaður sjálvur hevur arbeitt við málinum sum grannskoðari, og at niðurstøðan hjá landsgrannskoðaranum um brot á tolllógina seinni so dyggiliga bleiv undirkend av ákæruvaldinum.

Eisini er kringvarpið vitandi um, at Jørgen Niclasen ongantíð hevur havt nakran møguleika at verja seg í málinum.

Av málinum framgongur, at landsgrannskoðarin í september 1992 hevur skrivað frágreiðing um málið, at tollvaldið sum úrslit av hesi frágreiðing setti í verk eitt skerpað eftirlit av virkseminum hjá P/f N. Niclasen, at tollvaldið fráboðaði málið til løgregluna í 1993, og at løgreglan framdi umfatandi kanningar í málinum.

Jørgen Niclasen verður ongantíð kunnaður um hetta, og hann fær ongantíð nakran møguleika at gera viðmerkingar til niðurstøðurnar hjá landsgrannskoðaranum. Jørgen Niclasen verður ikki fyrr enn í 2008 kunnaður um, at eitt sektarmál hevur verið reist móti honum.

Tollvaldið hevur heldur ongantíð fyrihildið Jørgen Niclasen eina skuldseting um, at hann skal hava snýtt í tolli, og hann er ongantíð persónliga kravdur eftir nøkrum tolli yvirhøvur.

Av málinum framgongur eisini, at Jørgen Niclasen ikki fyrr enn í 1992 verður kunnaður um, at tollkreditturin er uppsagdur. Eftir hetta verður tollurin goldin, og skuldin til tollvaldið, sum er uppstaðin eftir januar 1988, bleiv eisini munandi niðurgoldin, meðan Jørgen Niclasen var stjóri fyri P/f N. Niclasen.

Jørgen Niclasen royndi saman við familjuni at rekonstruera felagið, sum var í fíggjarligum trupuleikum. Skotin varð inn nýggjur peningur í felagið, sum allur bleiv brúktur til at niðurgjalda gomlu tollskuldina við. Hendan skuld var annars uppstaðin langt áðrenn Jørgen Niclasen bleiv stjóri fyri felagið.

At bera fram tíðindi um, at Jørgen Niclasen skal hava snýtt í tolli, er ein skuldseting um, at hann skal hava framt revsiverd viðurskifti.

Tað er eingin ivi um, at kringvarpið er vitandi um – ella átti at vitað – at tað ongantíð hevur verið nakað grundarlag fyri at skuldseta Jørgen Niclasen fyri at hava snýtt í tolli.

Uppaftur verri gerst støðan, tá Kringvarpið í síni herferð móti Jørgen Niclasen í stríð við vanlig princip fyri eitt rættarsamfelag vendir próvbyrðuna á høvdið. Sambært fleiri innsløgum í Degi og Viku verður sagt, at nú áliggur tað Jørgen Niclasen at reinsa seg móti hesum skuldsetingunum. Tá hann ikki kann reinsa seg, er hann sekur.

Við øðrum orðum hevur Kringvarpið longu úthongt Jørgen Niclasen at vera sekan í tollsviki. Reglurnar um góðan fjølmiðlasið áseta, at tíðindafólk ikki skula átaka sær dømandi leiklutin.

Ítøkiliga meti eg, at Kringvarp Føroya hevur brotið hesar ásetingar í reglum um góðan fjølmiðlasið:

1. Kringvarp Føroya hevur brotið ásetingina í pkt. 3.2 við ikki at eftirkanna, at tær upplýsingar, sum vera bornar fram, eru rættar.

2. Kringvarp Føroya hevur brotið ásetingina í pkt. 3.6, við tað at kringvarpið hevur medvirkað til at almannakunngera tilfar, sum er útvegað undir revsiverdum viðurskiftum, nevniliga frá einum fyrrverandi grannskoðara hjá Landsgrannskoðaranum, sum hevur brúkt upplýsingar frá sínum fyrrverandi starvi til tess at seta í gongd eina jagstran mótvegis Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni.

3. Kringvarp Føroya hevur brotið ásetingina í pkt. 4.1, við tað at framløgan av tíðindunum ikki hevur verið saklig og umhugsað. Kringvarp Føroya hevur verið vitandi um, at tíðindini einans byggja á eina persónliga hugsan hjá einum tíðindamanni, sum er undirkend av Føroya Landfúta.

4. Kringvarp Føroya hevur eisini brotið ásetingina í pkt. 4.2, við tað at tað ikki hevur verið sagt nakað um, hvaðani tíðindini um, at Jørgen Niclasen skal hava snýtt í tolli, stava frá, herundir at talan í veruleikanum er um óítøkiligar upplýsingar, sum ikki byggja á skjalprógvaðar faktiskar umstøður.

5. Kringvarp Føroya hevur brotið ásetingina í pkt. 4.5. Tað er sjálvsagt ein meginregla í okkara rættarskipan, at eingin er sekur, fyrr enn hann er dømdur sekur. Tíðindini í Kringvarpi Føroya geva hyggjaranum/lurtaranum eina greiða fatan av, at Jørgen Niclasen er sekur í at hava snýtt í tolli. Fjølmiðlafólk eiga at virða grundregluna um, at skuldarspurningurin er ikki avgjørdur, fyrr enn viðkomandi er dømdur fyri eitt lógarbrot. Í hesum liggur eisini, at fjølmiðlafólk eiga at virða tær niðurstøður, sum ákæruvaldið er komið fram til. Eftir stendur, at Kringvarpið ikki hevur nakað grundarlag fyri at seta fram skuldsetingar um revsiverd viðurskifti mótvegis Jørgen Niclasen.

Tað frítekur heldur ikki Kringvarp Føroya fyri ábyrgd, at keldan til tíðindini verður endurgivin.

Tað er rætt, at Jørgen Niclasen er almennur persónur við tað, at hann er landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Hendan støða frátekur ikki Jørgeni Niclasen hansara rættindi sum borgari og hansara rætt til verju ímóti at verða skuldsettur fyri revsiverd viðurskifti.

Um Kringvarp Føroya ikki beinanvegin tekur hesar skuldsetingar aftur og rættar hesi tíðindi, verður farið víðari við málinum, herundir verður kæra send Fjølmiðlakærunevndini.

Vinarlig heilsan

Christian Andreasen, adv.
cfa@jura.fo